# ÍSLAND ER YNSKIÐ HJÁ FLEIRI AV LEIKARUNUM

Sosialurin hevur spurt átta av føroysku EM-hetjunum, hvørjum liðum teir vilja møta í EM-endaspælinum í Týsklandi. Lutakastið verður komandi mikudag 10. mai



HERI SIMONSEN

Mikudagur 10. mai verður eisini ein søguligur dagur í føroyskari hondbóltssøgu og í føroyskari ítróttarsøgu. Tá eru Føroyar fyri fyrstu ferð í pottinum til eitt bólkalutakast í einum endaspæli fyri A-landslið í hondbólti.

Føroyar eru saman við Montenegro, Sveis, Rumenia, Grikkalandi og Georgia í tí fjórða og niðasta styrkisbólkinum.

Í førunum hjá Grikkalandi og Georgia er eisini talan um fyrsta EM-endaspælið nakrantíð.

EM-endaspælið verður avgreitt í Týsklandi millum 10. og 28. januar í 2024. Vertsbýir eru Düsseldorf, Hamburg, Berlin, Köln, Mannheim og München. Tað heilt serliga við Merkur-høllini í Düsseldorf er, at har verður pláss fyri 50.000 áskoðarum, ið er eitt óvanliga høgt tal av áskoðarum til hondbóltsdystir.

Týskland verður í bólki A, og fer at spæla sínar bólkadystir í Merkur-høllini í Düsseldorf.

## Fýra norðurlond eru í ovasta styrkisbólkinum

Norðurlond eru sterk í hondbólti, og sannlíkindini fyri, at vit koma í bólk við eitt norðurland eru rættiliga stór.

Í ovasta styrkisbólkinum eru bæði Danmark, Svøríki, Ísland og Noreg. Hini bæði liðini í ovasta styrkisbólkinum eru Spania og Frakland.

Í næstovasta styrkisbólkinum eru Týskland, Niðurlond, Ungarn, Slovenia, Portugal og Eysturríki.

Í triðja styrkisbólkinum eru Kroatia, Póland, Kekkia, Serbia, Norðurmakedonia og Bosnia Hersogovina.

Longu nú er staðfest, at Ísland verður í bólki C og fer at spæla sínar bólkadystir í München. Noreg verður í bólki D og fer at spæla sínar bólkadystir í Berlin.

Svøríki verður í bólki E og fer at spæla sínar bólkadystir í Mannheim.

Danmark verður í bólki F og fer at spæla sínar bólkadystir í olympisku høllini í München.

## Satchwell droymir um setanardyst í Düsseldorf

Sosialurin hevur spurt átta av føroysku EM-hetjunum, hvat ynskilutakast teir hava.

Pauli Mittún leggur fyri:

– Eg ynski Frakland, Týskland og Bosnia. Hugsi at tað er nokk so kul at spæla ímóti Fraklandi og at spæla ímóti Týsklandi á útivølli við fullari høll.

– Og so kann ein vóna at kunna taka eitt stig ímóti Bosnia, tí móti liðunum úr tveimum teimum ovastu styrkisbólkunum verður tað uttan iva torført at fáa stig, óannsæð hvat, sigur Pauli.

Málverjin, Nicholas Satchwell sigur:

– Dreymabólkurin vildi verið at komið í bólk A og sloppið at spælt EM-setanardystin framman fyri 50.000 áskoðarum í Düsseldorf móti júst Týsklandi. Um tað ikki letur seg gera, so vil eg siga dystir móti Íslandi, Niðurlondum og Bosnia í München.

Liðfelagin hjá Nicholas Satchwell í KA, Allan Norðberg, ynskir Ísland:

– Tað altíð stuttligt at fáa eina grannauppgerð, og so er ein eisini komin at kenna nakrar á Íslendska landsliðnum gjøgnum árini. Og so ynski eg antin Eysturíki ella Norðurmakedonia – eg trúgvi, at tey passa væl til okkara spælistíl, og eg haldi, at vit kunnu revsa tey við okkara skjóta spælistíli, sigur Allan.

## Elias ynskir Noreg

Elias Ellefsen á Skipagøtu spælir í Svøríki, og hann skal komandi kappingarár spæla við THW Kiel í Týsklandi. Kortini ynskir Elias hvørki Svøríki ella Týskland úr ovasta styrkisbólkinum:

– Eg ynski Noreg, Niðurlond og Norðurmakedonia, sigur Elias.

Pætur Mikkjalsson, ið júst hevur vunnið næstbestu svensku hondbóltsdeildina við AMO ynskir heldur ikki Svøríki úr ovasta styrkisbólkinum:

– Eg ynski Danmark, Slovenia og Bosnia, sigur Pætur.

Leivur Mortensen hellir meira til meirilutan av leikarunum:

– Eg vil koma í bólk saman við Íslandi, Niðurlondum og Norðurmakedonia, sigur Leivur.

## Óli og Hákun ynskja báðir Ísland

Yngsti maðurin í EM-hópinum verður væntandi Óli Mittún. Um EM-lutakastið sigur Óli:

– Tað er eitt sindur torført at velja eitt lið úr styrkisbólki 1, men skal eg velja nakran, so velji eg Ísland, tí eg hugsi, at vit høvdu passað best til teir. Úr styrkisbólki 2 Niðurlond, tí teir líkjast eisini nógv okkum í spælistíli. Úr styrkisbólki 3 hevði eg valt Bosnia ella Norðurmakedonia, tí tey eru tey veikastu liðini í tí styrkisbólkinum, sigur Óli.

Hákun West av Teigum ynskir eisini Ísland úr styrkisbólki 1, men eitt annað mótstøðulið úr styrkisbólki 2:

– Úr styrkisbólki 1 ynski eg Ísland, ið eg haldi er liðið, vit hava størsta møguleikan ímóti. Hini fimm liðini hava øll bæði betri og breiðari hópar. Úr styrkisbólki 2 hevði eg valt Eysturríki ella Portugal. Hini liðini í styrkisbólkinum eru størri og sterkari, men vit hava jú sæð, at vit kunnu spæla upp ímóti Eysturríki. Portugal er eitt lið, ið kann spæla upp ímóti teimum bestu liðunum, men teir kunnu eisini væl og virðiliga knekka. Úr styrkisbólki 3 er tað heilt klárt Norðurmakedonia ella Bosnia. Tað eru lið sum hava nakrar profilar, men sum eisini hava nógvar veikleikar. Og so eru hini liðini í styrkisbólki 3 sterk, sum t.d. Kroatia og Serbia, sigur Hákun.

